# HALLÓ



## Magnus Rasmussen,

*borgarstjóri í Runavíkar kommunu*

**Hvussu er støðan í tíni kommunu, nú fiskavirkið liggur stilt, og seks skip eru løgd?**

- Hetta er ein ólukkulig støða, og eg vóni, at virkið skjótt letur uppaftur, eins og skipini skjótt loysa aftur. Faroe Seafood í Runavík hevur altíð havt gott orð á sær, sum eitt væl rikið fiskavirkið við dugnaligum fólki. Vit hava góð havnaviðurskifti til skipini, landingarmiðstøð og dugnaligar veitarar í økinum. Tí vóna vit virkuliga, at alt tað virksemi, sum nú liggur lamið í økinum, kemur uppaftur at koyra sum skjótast.

**Hvat merkir fiskivinnan fyri tína kommunu?**

- Fiskivinnan hevur alstóran týdning, bæði fyri lívsgrundarlagið og sjálvvirðiskensluna hjá hesum fólkum og familjum, men ikki minni fyri allar tær avleiddu vinnur, sum hetta virksemi skapar. Í Runavíkarøkinum eru veitarar av eitt nú nautiskari útgerð, smiðjur og flutningsfeløg, sum fáa nakað burtur úr, at skip og virkir eru í gongd. Haraftrat kemur, at ríka handilslívið so sanniliga eisini fær ágóðan av vinnuvirkseminum.

**Hvat ynski hevur tú, Magnus Rasmussen, borgarstjóri?**

- Eg vil gjarna sleppa at siga, at Runavíkar býráð ógvuliga gjarna vil, at tað virksemi, sum verið hevur og sum beint nú liggur lamið, kemur í gongd aftur sum skjótast.

# Duld boð í eygunum hjá Monu Lisu

**Granskarar hava funnið evarska smá tøl og bókstavir í eygunum á heimskenda málninginum hjá Leonardo da Vinci**



Rólant Waag Dam

Nú verður dúgliga gitt um orsøkirnar til hetta.

Tað eru italskir granskarar, sum hava nærlisið myndina Mona Lisa við sjóneyku og hava tá lagt merki til, at Leonardo da Vinci eftir øllum at døma hevur skrivað bæði tøl og bókstavir inn í myrku eyguni á kvinnuni, hann brúkti so langa tíð um at mála.

Danska heimasíðan bt.dk ber tíðindini frá Daily Mail í morgun. Tey endurgeva eisini ein av granskarunum fyri at siga, at tølini og bókstavarnir ikki síggast vanligt, men við sterkari sjóneyku er eingin ivi.

Í høgra eygnasteini standa bókstavirnir L og V. Kanska ein stytting fyri Leonardo da Vinci. Í vinstra eyga er tað nakað óklárari. Har sæst ikki heilt, um tað stendur CB ella CE og L2 ella 72.

Granskararnir vísa á, at málningurin er 500 ára gamal og tí eru tølinini og bókstavirnir ikki so sjónlig nú sum tá. Hinvegin eru teir ivaleysir í, at Leonardo da Vinci heilt tilvitað hevur skrivað stavirnar og tølini inn í eygu Mona Lisu. Hetta ikki minst tí, at Leonardo da Vinci brúkti so nógva tíð og orku upp á júst henda málningin, og at hann eisini sendi duld boð við ymsum súmbolum.

## Í MORGIN

**6/9 °C**




Fyrrapartin fleyr til gul av útsynningi, men seinnapartin veksur hann vindin upp í stívt andøvsgul. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 6 og 9 stig.

## MIKUDAGIN

**3/6 °C**




Fyrrapartin strúkur í vindi av vestri, seinnapartin sama vindferð av útnyrðingi. Kavaælingur og hitalagið fellur niður millum 3 og 6 kuldastig.

## HÓSDAGIN

**4/7 °C**




Hvassur vindur upp í storm av norði og kavaælingur. Hitalagið millum 4 og 7 kuldastig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og eystri, leygardagin minni vindur av eystri. Kavaælignur, men eisini sólglottar og hitalagið millum frostmarkið og -4 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðsti nátt:**
Eitt hátrýst, 1030 hPa. yvir Skotlandi verður við Føroyar komandi nátt.




**Komandi nátt:**
Hátrýstið við Føroyar fer spakuliga suðureftir.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 142 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

13. desember — Fyrra kvarter. Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13. des | - | 12:17 | 11:17 | 23:50 | 11:29 | - | 01:45 | 14:17 | 02:45 | 15:17 | 10:29 | 23:05 | 09:29 | 22:04 | 00:00 | 12:29 | 01:00 | 13:29 | - | 12:02 | 00:45 | 13:17 |
| 14. des | 00:50 | 13:21 | - | 12:21 | 00:05 | 12:36 | 02:50 | 15:21 | 03:50 | 16:21 | 11:36 | - | 10:37 | 23:08 | 01:05 | 13:36 | 02:05 | 14:36 | 00:35 | 13:06 | 01:50 | 14:21 |
| 15. des | 01:53 | 14:11 | 00:53 | 13:11 | 01:08 | 13:26 | 03:53 | 16:11 | 04:53 | 17:11 | 00:08 | 12:26 | 11:26 | 23:44 | 02:08 | 14:26 | 03:08 | 15:26 | 01:38 | 13:56 | 02:53 | 15:11 |
| 16. des | 02:29 | 14:48 | 01:29 | 13:48 | 01:44 | 14:03 | 04:29 | 16:48 | 05:29 | 17:48 | 00:44 | 13:03 | - | 12:03 | 02:44 | 15:03 | 03:44 | 16:03 | 02:14 | 14:33 | 03:29 | 15:48 |
| 17. des | 03:08 | 15:29 | 02:08 | 14:29 | 02:23 | 14:44 | 05:08 | 17:29 | 06:08 | 18:29 | 01:23 | 13:44 | 00:23 | 12:44 | 03:23 | 15:44 | 04:23 | 16:44 | 02:53 | 15:14 | 04:08 | 16:29 |